# TILTØK

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya,
Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919,
hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210,
gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832,
trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883,
kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**LISA**
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Ryttergården, Pederstrup
2750 Ballerup

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir:
mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur:
radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða:
www.radgevingin.dk

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtíð týsdag kl. 17-18.
Kórvening týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólíka vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Áarstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altíð vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Århus.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 14.6. Gøta, tlf. 44 10 86
Sunnudagin 15.6. Runavík, tlf. 44 70 10

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 21. juni kl. 14.00 verða vígd í Ebeltoft kirkju, Sólmai Johansen, Strendur og Lars Stig, Bredstrup, Ebeltoft. Brúdleypsadr.: Ahl. Kolonien, Birkestien 19, 8400 Ebeltoft.

Leygardagin 5. juli kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Annelisa Berthelsen, Strendur og Jens Kristian Rasmussen, Sandavágur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 447166, 333569 ella 332350 í seinasta lagi 16. juni.

Leygardagin 5. juli giftast Anna Maria Sjóstein og Heðin á Lakjuni, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, kunnu ringja á tlf. 262368, 225701, 456068 ella 456021 innan 27. juni.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Anita Sigurdsdóttir Simonsen og Herálv Jensen av Sandi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 361920, 361484 ella 361111.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Hósvíkar kirkju Súsanna Kelduberg, Nólsoy og Hans Andrias Joensen, Hósvík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 318541, 315638 ella 422102 innan 14. juni.

Leygardagin 19. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Jana K. Heinesen, Strendur og Rói H. Rasmussen, Argir. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 447470 ella 314699 í seinasta lagi 1. juli.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Jutta Augustinussen, Vágur og Sigmund Olsen, Hvalba. Veitslan verður í Roynhøllini í Hvalba kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 373073 ella 375222 ella 0045 76253517 í seinasta lagi tann 1. juli.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Klaksvík Vígdis Kristiansdóttir og Jógvan Skorheim, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður kl. 19.00 á Hotel Norð á Viðareiði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 455931, 224921, 455553 ella 221849 í seinasta lagi 1. juli.

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast í Hvalbiar kirkju Poula Næs, Hvalba og Rúni Thomsen, Froðba, búsitandi á Eiði. Vælkomst verður í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma til veitsluna, verða biðin um at siga frá á tlf. 423393 ella 221133 innan 7. juli 2003.

## SILVURBRÚDLEYP

Sunnudagin 15. juni hava hjúnini Bina Klakstein og Heri Ellingsgaard, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 14. juni, millum kl. 11-16.00, við ábiti og morgunmati (brunch) í Skálanum í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

8. juli hava hjúnini Jóna og Eyðun (Sammi) Augustinussen á Argjum verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypið verður hildið 12. juli kl. 19.00 í HB-húsinum. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 316587, 266887 ella 229365 í seinasta lagi 28. juni.

19. juli halda Sunrid og Kristian Martin Jacobsen, Hósvík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 422386 ella 212386 í seinasta lagi tann 6. juli.



# Írlandsfararar bjóða til konsert í Eiðis kirkju

TÍÐINDASKRIV
*frá Vestmanna Sangkóri*

Sunnukvøldið 15. juni kl. 19.00 fer eitt styrkt Vestmannakór at syngja ein knappan tíma í Eiðis kirkju.

Hetta er konsert, ið er liður í fyrireikingunum til Írlandsferð seinni í mánaðinum. Vestmanna Sangkór fer til Írlands 26. juni at luttaka í Killarney Sommerfestival. Killarney liggur í landspartinum Kerry í útsynningshorninum av Írlandi.



Killarney Summerfestival er ein nýggj og sera fjølbroytt mentunarstevna við tónleiki, sjónleiki, myndalist og nógvum øðrum ymiskum mentunartiltøkum. Av tónleiki verða bæði klassiskur, fólkatónleikur og popp- og rokktónleikur. M.a. kunnu nevnast The Cranberries, The Counting Crows og David Grey. Har verður ein ørgrynna av tiltøkum, sum ikki er rúm fyri at nevna, men tað sæst alt á spennandi heimasíðuni www.killarneysummerfest.com

Til sjálva mentunarstevnuna verða tvær framførslur í Killarney. Haraftrat verða tvær í grannabýunum Kenmare og Annascoul, og á heimleiðini verður so eisini ein konsert í Høvuðsstaðið Írlands, Dublin.

Kórið hevur fingið nakrar eyka sangarar úr Fuglafirði, av Eiði og úr Havnini tí fleiri av føstu limunum ikki kundu koma við uttanlands. Umráðandi er at hava eitt vælmannað kór til slíka uttanlandsferð.

Sangskráin er í 4 pørtum. Gomul føroysk sálmaløg og kvæði, eldri føroyskar kórperlur, nýggjur kórtónleikur og so útlendskur kórtónleikur. Skráin skuldi sostatt umboða ein stóran part av tí vit kunnu kalla føroyskan kórtónleik.

Heitini á skránni eru hesi:

1. Harra Guð títt dýra navn – gl. fø. sálmalag
2. Sum ígjøgnum sortar skýggjar – gl. fø. sálmalag
3. Nú rennur sólin fríð – gl. fø. sálmalag
4. Í Noregi búðu raskir menn – kvæðalag
5. Føroyar mín móðir - Pól F./Knút Olsen
6. Í búri – J. Djurhuus/ Waagstein/Clausen
7. Í sirmi – H. A. Djurhuus/Waagstein/ Clausen
8. Brót so stillan, bylgja blá – H. A. Djurhuus/ Regin Dahl/Kári Bæk
9. Jarðareygað – T. N. Djurhuus/Kári Bæk
10. Og dansurin gongur – T. N. Djurhuus/Kári Bæk
11. Lækjan – Christian Matras/Kári Bæk
12. Orðini – Rói Patursson/Bjarni Restorff
13. Lover nu Herren/Mín sál Guðs lov nú syngi – hetta er ein samankomponering av týskum & fø. sálmalag / Kári Bæk
14. Sankta Magnus hymna – Gomul Orkney hymna
15. Laudate - Bíbliutekstur/Knut Nysted
16. Ave Maria – Tomas Luis de Victoria
17. Glædjens blomster – Svenskur/Hugo Alfvén

Øll eru hjartaliga vælkomin til konsertina.




HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 14.06. kl. 21³⁰
Leygardagin 14.06. kl. 23³⁰
Sunnudagin 15.06. kl. 21⁰⁰
Sunnudagin 15.06. kl. 23⁰⁰



Leygardagin 14.06. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 15.06. kl. 22¹⁵



Leygardagin 14.06. kl. 19³⁰
Sunnudagin 15.06. kl. 19⁰⁰



Leygardagin 14.06. kl. 20⁰⁰
Sunnudagin 15.06. kl. 19³⁰

KOMANDI FILMAR



Frumsýning
Fríggjadagin 20.06.



Frumsýning
Fríggjadagin 20.06.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu